# Tøkningur til Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er eitt fulltíðar starv sum tøkningur leyst at seta sum skjótast.

HTM er deild Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 11 fólk á HTM.

Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar
- tvørfakligt samstarv – innan- og uttanhýsis

**Talan er um sera fjølbroytt og spennandi starv, ið m.a. fevnir um:**
- meting um tøkniligar loysnir
- fremjing av tøknuligum loysnum
- meting um dygd av hjálpartólum
- skipa fyri umvælingum av hjálpartólum innan- og uttanhýsis
- heimavitjanir saman við terapeutum
- ráðgeving í sambandi við íbúðarbroytingar
- størri tillagingar av hjálpartólum saman við terapeutum
- viðlíkahald av eykalutagoymslu
- fyrisitingarligar uppgávur

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- viðkomandi útbúgving (maskinmeistari ella aðra tøkniliga útbúgving)
- royndir frá el- ella maskinhandverksvinnu er ein fyrimunur
- áhuga at arbeiða við hjálpartólum
- góð samstarvsevnir
- evnir at arbeiða sjálvstøðugt
- telduførleika

**Vit kunnu bjóða:**
- neyðuga eftirútbúgving og upplæring
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- nýggja tøkni
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen, leiðara ella Willy Jan Feilberg, tøkning tlf. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 28. apríl 2003 kl. 14.00.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## FØROYA STUDENTASKÚLA OG HF-SKEIÐ

Hoydalar • Tórshavn • Føroyar
Tlf. +298 312973 • Fax +298 318624

Frá 1. august 2003 at rokna verða **7-9** ársvikariatir leys at søkja í hesum lærugreinum:

**lívfrøði, donskum, enskum, evning, alisfrøði, føroyskum, søgu, ítrótti, støddfrøði, samfelagsfrøði og týskum**

treytað av faksamansetingini hjá umsøkjarunum. Umsøkjarar eiga at gera vart við, hvørjar aðrar lærugreinir teir hava undirvísingarførleika í. Umsøkjari, ið ikki hevur lokið prógv í námsfrøði fyri setanardagin, skal taka lut í innleiðsluskeiði í námsfrøði, sum Mentamálaráðið skipar fyri í august í 2003 – í viku 33.

Í sambandi við starvsetanina leggur skúlin dent á, at umsøkjarar hava kunnleika um føroysk mál og føroysk samfelagsviðurskifti, og at umsøkjarar eru áhugaðir í at ogna sær hetta innlit. Skúlin leggur somuleiðis dent á, at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, kunningartøkni og nýggir arbeiðshættir eru týðandi tættir.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um skúlans stevnumið, um teir venda sær til leiðslu skúlans ella kunna seg á heimasíðu skúlans: www.hoydalar.fo.

Umsókn á oyðublaði frá YF ella GL verður stílað til Føroya Landsstýri, Mentamálaráðið, Tórshavn, men verður sent til:

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**
**att.: Mads Winther, rektari**
**Hoydalar**
**FO-188 Hoyvík**
**Føroyar**

í seinasta lagi 6. mai 2003.

Avrit av próvtøkuskjølum ella útskrift úr próvtøkuprotokoll skulu sendast saman við umsóknini. Setanarsamrøður fara fram miðskeiðis í mai.

team85 • 358000

## Barnagarðurin á Velbastað sóknast eftir

# hjálparfólki

Sóknast verður eftir tímaløntum hjálparfólki at arbeiða mánadag og hósdag á stovu við 11 børnum. Starvið er 16 tímar um vikuna. Harumframt er arbeiðsuppgávan, at vera avloysari í barnagarðinum.

Væntandi verður møguleiki fyri føstum starvi eftir summarfrítíðina.

Ynskiligt er, at tú hevur arbeitt á dagstovni áður.

**Umsókn**
Umsóknir skulu vera Barnagarðinum í hendi seinasta lagið 28. apríl.

Nærri fæst at vita á tel 328121. Spyr eftir Hannu Jacobsen, leiðara ella Elsu Jacobsen, varaleiðara.

**KIRKJUBØAR KOMMUNA**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Arbeiðsfólk

Søkt verður eftir arbeiðsfólki, til asfaltliðið hjá Tórshavnar Kommunu

Nærri fæst at vita við at seta seg í samband við Snarskivuna á tlf: 315160.

SNARSKIVAN

## ADAPT ADOPT ?

Kender du resten?
Hvis du har/eller har haft et tilhørsforhold til vores klub, så kontakt mig venligst på telefon +45 20 20 47 04 eller via e-mail michael@rothmann.dk

Jeg søger bosiddende på Færøerne, som kan hjælpe mig i mit forsøg, med at starte en klub på Færøerne.

Med venlig hilsen
Michael Rothmann
?27 Slagelse, Danmark

## FA. GRAVSTEINAR




Opi¶: m nadag - fr ggjadag 9⁰⁰-17⁰⁰
annars samb rt avtalu.

V¿ruskr kann f ast!

Sj nband - 31 77 74



## FØROYA STUDENTASKÚLA OG HF-SKEIÐ

Hoydalar • Tórshavn • Føroyar
Tlf. +298 312973 • Fax +298 318624

Treytað av góðkenning frá játtandi myndugleikum verður frá 1. august 2003 at rokna **3-4** føst størv leys at søkja sum adjunktur/lektorur við faksamanseting ætlað til lærugreinaráðið í studentaskúlum og HF-skeiðum. Størvini eru treytað av faksamansetingini hjá umsøkjarunum. Hesar lærugreinir hava serligan áhuga:

**teldufrøði, heimsspeki, føroyskt, geografi, ítróttur, støddfrøði, samfelagsfrøði og spanskt**

Umsøkjarar eiga at tilskila, hvørjar aðrar lærugreinir innan studentaskúla- og HF-skipanina teir hava undirvísingarførleika í. Umsøkjari, ið ikki hevur lokið prógv í námsfrøði fyri setanardagin, skal taka lut í innleiðsluskeiði í námsfrøði, sum Mentamálaráðið skipar fyri í august 2003 – í viku 33. Nýsett starvsfólk skulu sambært føroyskari kunngerð um námsfrøði hava staðið námsfrøðiliga útbúgving í seinasta lagi tvey ár eftir setanardagin.

Í sambandi við starvssetanina leggur skúlin dent á, at umsøkjarar hava kunnleika um føroyskt mál og føroysk samfelagsviðurskifti, og at umsøkjarar eru áhugaðir í at ogna sær hetta innlit. Skúlin leggur somuleiðis dent á, at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, kunningartøkni og nýggir arbeiðshættir eru týðandi tættir.

Gjørt verður vart við tveyárasáttmálan, ætlaður umsøkjarum við vantandi føroyskum málførleika og vantandi kunnleika um føroysk samfelagsviðurskifti. Tað vil siga, at umsøkjarin verður settur í tíðaravmarkað starv fyri tvey ár. Skúlin rindar kostnaðin hjá umsøkjaranum fyri flyting og ferð fram og aftur millum verandi bústað og Føroya Studentaskúla og HF-skeið. Skúlin endurrindar í mesta lagi 30.000 kr. fyri flyti- og ferðaútreiðslur hvønn vegin – gevið gætur – upphæddin er skattskyldug. Ætlar umsøkjarin at halda fram í starvinum eftir tveyáraskeiðið, skal umsøkjarin søkja starvið av nýggjum á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar. Áhugaði kunnu venda sær til skúlan.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um skúlans stevnumið, um teir venda sær til leiðslu skúlans ella kunna seg á heimasíðu skúlans: www.hoydalar.fo.

Umsókn á oyðublaði frá YF ella frá GL verður stílað til Føroya Landsstýri, Mentamálaráðið, Tórshavn, men verður sent til:

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**
**att.: Mads Winther, rektari**
**Hoydalar**
**FO-188 Hoyvík**
**Føroyar**

í seinasta lagi 6. mai 2003.

Avrit av próvtøkuskjølum ella útskrift úr próvtøkuprotokoll skulu sendast saman við umsóknini. Setanarsamrøður fara fram miðskeiðis í mai.

# Ársaðalfundur

Ársaðalfundurin hjá »Føroya Pro Vita« verður **leygardagin 10. mai kl. 14.00** á Studenta- & HF-skúlanum á Kambsdali.

Bergur Debes Joensen, sóknarprestur, Poul Jóhan Djurhus, trúboðari og Tummas Jacobsen, trúboðari, fara at lýsa evni: **»Meinigheitin og stríðið fyri ófødda barninum«.**

Kl. 15.00 Drekkamuður
Kl. 15.20 Skrá samb. lógumf elagsins.

**v/ Føroya Pro Vita**
**Ólavur í Mittúni, form.**

# Hey Suðuroyingar

Leygardagin tann 26. apríl letur stór framsýning upp á Gistingarhúsinum í Øravík.

Tað er barnaútgerðarhandilin VØGGAN í Saltangará, ið sýnir alt tað nýggjasta fram, so sum: ***barnavognar, koyristólar, sengur, vøggur, bilstólar og mangt mangt annað.***



**Opið er frá kl. 10.00 til 19.00**

VØGGAN á Saltangará
Tlf. 449588 - Fax. 499499

# Summar Aerobic

*Byrja verður mánadagin 28. apríl, og vit enda 29. juni*

## AEROBIC

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Leygardag |
|---|---|---|---|---|
| 17:00 – 18:00 Stór/ur *Elsa Maria/Florentze* | 19:00 – 20:00 Byrjarir *Saranja* | 18:30 – 19:45 Stepp/Styrki *Kirstin* | 16:30 – 17:30 Stór/ur *Elsa Maria/Florentze* | 10:00 – 11:15 Mix *Ymisk* |
| 18:30 - 19:30 Trimmari Øll *Oddvør* | | 19:45 – 20:45 Aeroboxing *Kirstin* | 17:30 - 18:30 Aerobic Vand *Tórhalla* | |
| 19:30 - 20:30 Aeroboxing *Saranja* | | | 18:30 - 19:30 Trimmari Øll *Tórhalla* | |

Yndi bjóðar aftur nú øllum okkurt slag av kropsvenjing. Kvinnum sum monnum, ungum sum eldri, stórum sum smáum, sterkum sum veikum.
Kom framvið og fá tær eitt prát.

## SPINNING

Stórt høli, betri og fjølbroyttari venjing

| Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 17:15 – 18:15 Spinn & Trimm *Óluva* | 17:15 – 18:15 Spinn & Trimm *Tórhalla* | | 17:15 – 18:15 Spinn & Trimm *Óluva* |

**KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ:** **SKÚLANÆMINGAR**

| | | |
|---|---|---|
| 1 tíma um vikuna: | 350 kr. | 20% avsláttur |
| 2 tímar um vikuna: | 550 kr. | 20% avsláttur |
| 3 tímar um vikuna: | 700 kr. | |

*Tilmelding á telefon 32 16 32 - 31 76 71 - 31 13 11ella møti bara til tíman ið tit ynskja at ganga til*

## BALLETT

*Street-Funk-Jazz-Modern-Standard*

**Byrjað verður aftur 22. apríl, og hildið verður á til 22. mai, tá framsýning verður í Norðurlandahúsinum**

| Týsdag | Mikudag | Fríggjadag |
|---|---|---|
| 18:00 – 19:00 15 ár og eldri *Jóna* | 16:30 – 17:30 10-11 ár *Rannvá* | 16:30 – 17:30 6-10 ár *Barbara* |
| | 17:30 – 18:30 12-14 ár *Rannvá* | |

**Yndi** *leigar tímar til feløg, fyritøkur og onnur. Ring og tosa við Elsu Mariu Eisini ber til at fáa persónlig venjing*



# YNDI

*v/ Elsu Mariu Bærentsen*
*www.yndi.fo*

Yviri við Strond 21 - tlf 311 311 - FO-100 Tórshavn - far. 213 213 - e-mail: yndi@yndi.fo

veitst tú ikki tað? Sosialurin